# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

# Lágtrýst trýstir oljuprísin upp



*Í morgun var Gonu sunnan fyri pakistonsku strondina*

**Tropiski stormurin Gonu kann raka oljuútbúnaðin við Persaflógvan, og tað ávirkar oljuprísin**

Í morgun var tropiski stormurin Gonu sunnan fyri Pakistan, men veðurmenninir í økinum siga, at hann hevur kós ímóti Persaflógvanum, og tað verður tikið í størsta álvara.

Í Oman hava herurin og løgreglan fingið boð um at standa tilbúgvin. Landið framleiðir umleið 700.000 tunnur av olju um samdøgrið, men har eru fleiri havnir, sum avskipa olju úr øðrum londum í økinum.

Onnur lond í økinum hava tikið onnur stig, men Saudiarabia og Sameindu Arabisku Emiratini hava boðað frá, at tey vænta ikki stórvegis skaða av illveðrinum.

Tíðindini um Gonu fingu alt fyri eitt ávirkan á prísin á altjóða oljumarknaðinum.

Olja, sum fyri vikuskiftið bleiv seld fyri góðar 69 dollarar, fór upp um 70 dollarar í gjár.

## Rættarmál um Screbrenica

**Avvarðandi hjá teimum, sum lótu lív í hópdrápinum, hava nú stevnt ST og Niðurlondum**

Fleiri túsund avvarðandi hjá teimum umleið 8.000 muslimsku monnunum og dreingjunum, sum lótu lív í Screbrenica-hópmorðinum í 1995, draga nú ST og niðurlendsku stjórnina fyri rættin.

- Hetta snýr seg ikki sum pengar, men um virðing, sigur Marco Gerritsen, sum er sakførari, og sum umboðar tey umleið 6.000, sum hava reist sakarmálið. Hann og umboð fyri tey avvarðandi hava arbeitt við málinum í fleiri ár, og tað var ikki av tilvild, at tað bleiv lagt fyri rættin í gjár. Tí sama dag fór krígsbrotsmannadómstólurin í Haag undir málið ímóti bosniaserbiska generalinum Zdravko Tolomir, sum verður settur í samband við hópmorðið í Screbrenica.

Tey avvarðandi krevja ST dømt, tí ST hevði lýst bosniska býin Screbrenica sum eitt trygt stað, har sivilfólk kundu kenna seg trygg. Niðurlendskir hermenn høvdu eftirlit við býnum, men teir vóru ikki førir fyri at forða bosniaserbiska herinum at taka seg inn í býin í juli í 1995. Tí hava tey avvarðandi eisini lagt sak ímóti Nirðurlondum.

## Politikari kann fáa 200 ára fongsul



*William Jefferson*

**Amerikanskur politikari ákærdur fyri mutur og svik**

William Jefferson, sum umboðar tann demokratiska flokkin í amerikanska Umboðsmannatinginum, er ákærdur fyri so grov lógarbrot, at tey kunnu geva honum upp í 200 ára fongsulsrevsing.

Fyri tveimum árum síðani fann løgreglan meiri enn eina hálva mió. krónur í einum kassa í frystiboksini heima hjá politikaranum, og nú er hann ákærdur fyri svik, mutur og onnur fíggjarlig lógarbrot í 16 ymsum førum.

Hóast illgrunin um svik og annað kom fram fyri meiri enn einum ári síðani, bleiv William Jefferson afturvaldur í Umboðsmannatingið fyri statin Lousiana á valinum seinasta heyst.

## STUTT SAGT

### Ákærur sleptar

Í USA hevur ein hernaðardómstólur gjørt av at sleppa ákærunum ímóti einum fanga í Guantanamo-leguni, tí fangin var bar 15 ára gamal, tá hann bleiv tikin í Afghanistan. Maðurin, sum er kanadiskur ríkisborgari, var millum annað ákærdur fyri morð, morðroynd og fyri at styðja yvirgang. Eygleiðarar í USA siga, at úrskurðurin hjá dómstólinum kann hava við sær, at ákærurnar ímóti øllum fangunum í Guantanamoleguni mugu sleppast. Harafturat er tað greitt, at úrskurðurin kemur George W. Bush, forseta, sera illa við, tí forsetin leggur stóran dent á at fáa Guantanamo-fangarnar dømdar.

### Bretar stúra

Ein kanning avdúkar, at í meðal brúka bretar 27 dagar um árið til at stúra, og at tað eru serliga fíggjarviðurskiftini og heilsustøðan, sum fáa tann einstaka til at stúra. Tað merkir við øðrum orðum, at í meðal brúkar ein breti fimm ár av sínum lívi til at sita og stúra. Í kanningini sæst eisini, at tað eru serliga tey ungu í Bretlandi, sum stúra, og tíggju prosent av teimum ungu brúka meiri enn tólv tímar um samdøgrið til stúran, sigur kanningin, ið eisini vísir, at kvinnurnar stúra meiri enn menninir.

### Doyði av fuglakrími

Í Kina hava heilsumyndugleikarnir staðfest, at ein kinesiskur hermaður er deyður av fuglakrími, og hann er tann 16. kinesarin, sum er deyður av sjúkuni. Myndugleikarnir siga, at tann 19 ára gamli hermaðurin gjørdi hertænastu í Fujan-landspartinum, sum er í landssyningspartinum av Kina. Miðskeiðis í mai bleiv staðfest, at hann hevði fingið fuglakrímið H5N1, og fyrradagin doyði hann, skrivar al-menna kinesiska tíðindastovan.